FAROE DIVE.fo

# Kavaraskúli




---

# Fjarðahús, Timburhandil & Byggibúð

**- søkir eftir fólki til goymsluna -**

Í sambandi við økt virksemi verður søkt eftir fólki til goymslu okkara í Kollafirði.

**Uppgávur:**
Arbeiði umfatar alt vanligt goymsluarbeiði, herundir móttøku, klárgering og útkoyring av vøru.

**Førleikakrøv:**
Umráðandi er, at viðkomandi:
- er røkin
- kennir ábyrgd fyri uppgávunum
- hevur góð samstarvsevni
- er fúsur at takað eitt eyka tak, í einum til tíðir rokmiklum umhvørvi.

**Løn og setanartreytir:**
Talan er um eitt fulltíðarstarv at byrja skjótast tilber. Lønin verður ásett eftir avtalu.

***Nærri upplýsingar um størvini:***
Nærri upplýsingar um starvi fáast við at venda sær til P/F Fjarðahús, Timburhandil & Byggibúð, Regin Joensen, telefon 472000.

**Umsóknir:**
Áhugaði kunnu venda sær til P/F Fjarðahús, Timburhandil & Byggibúð, telefon 472000 ella senda skrivliga umsøkn áðrenn 26. juni 2006.
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

**Fjarðahús**
Timburhandil & Byggibúð
- tú velur væl -

LANGASANDUR | FAX 472 001
410 KOLLAFJØRÐUR | FJARDAHUS@FJARDAHUS.FO
TEL. 472 000 | WWW.FJARDAHUS.FO

P/F Fjarðahús, Timburhandil og Byggibúð (Pf. Vestmanna Timburhandil) er stovnað í 1958, og hevur síðani 1977 selt og framleitt tey vælumtóktu Fjarðahúsini. Virksemi er nógv økt seinastu árini og í dag standa omanfyri 400 Fjarðahús í Føroyum. Umframt at framleiða Fjarðahúsini reka vit timburhandil og byggibúð.

---

# Feriuavloysarar til P/F Auto

Søkt verður eftir feriuavloysarum til P/F Auto.

**Ring 311234**

Auto
3-1-1-2-3-4

---

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ Starvsfólkadeildin

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktarfrøðingar ella Heilsurøktarar til G4

Á **G4** verður søkt eftir sjúkrarøktarfrøðingum og heilsurøktarum til feriuavloysan í juli og august 2006. Eisini er møguleiki fyri tímaløntum vaktum eftir avtalu.

Deildin er ein kirurgisk seingjardeild við servitan innan ortopædi, maga/tarm og urologi. Vit hýsa eisini sjúklingum við almenn kirurgiskum, gynækologiskum, eyga, oyra, nøs og hálsasjúkum. Á deildini er pláss fyri 24 sjúklingum.

Nærri fæst at vita um størvini við at ringja til Elin Vitalis, deildarleiðara á G4, á telefon 304500 lokal 5064 ella Ceciliu Vestureið, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102 e-postur ceci@lsh.fo

Løn- og setanartreytir smb. sáttmálan millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknarfreistin er 30. juni 2006 kl. 12.00.
*Tað er umsøkjarans ábyrgd, at umsóknin er á Lønar- og starvsfólkadeildini áðrenn freistin er úti.*

Skrivlig umsókn í brævbjálva merktur »umsókn til starv« við CV, autorisatión, avrit av prógvum og viðmælum e.l. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna "starvsfólk"*

---

Gallarí Jinx

## Kokkur ella køkshjálp

Gallarí Jinx søkir eftir kokki ella køkshjálp til at byrja beinavegin.

Talan er um 1 fulltíðarstarv, sum koyrur í vaktum.

Vit ynskja at tú verður við til at varðveita okkara góðu tænastu og í framtíðini til at verða ein partur av spennandi verkætlanum. Hesar verkætlanum kemur tú, saman við leiðsluni, at hava ein týðandi leiklut í.

Vit hopa at tú ert fyrikomandi, ábyrgdarfull / ur og røsk / raskur.

Løn sambært avtalu.

Meira kunning um arbeiðið fæst við at ringja til Hans á tlf 519383.

Umsókn skal sendast til:

**Gallarí Jinx**
Heygsbreyt 12
100 Tórshavn

Ella Hans@jinx.fo

tel 317101 • jinx@jinx.fo

Sosialurin 341800

---

**Heimarøktin og Serforsorgin**
*Serstovnadeildin*

# Pedagogar

## til Bústovnin og Sambýli á Rúnarvegi, Runavík

Undir Almanna- og heilsumálaráðnum og stovnum undir tí við fyribils tænastu á Bústovninum og Sambýlinum á Rúnarvegi í Runavík, eru tvey pedagogstørv leys at søkja.

Eitt tænastumannastarv frá 15. juli 2006 ella eftir nærri avtalu.

Eitt farloyvisstarv sum pedagogur í tíðarskeiðinum 15. august 2006 til 15. august 2007.

Talan er um fulltíðarstørv, og arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.

Arbeiðstíðirnar eru skiftandi og roknast skal við morgun-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisarbeiði.

Arbeiðið fevnir millum annað um at vegleiða búfólkið í øllum tí, sum tey hava tørv á, og at menna hvønn einstakan til at húsast saman í felagsskapi.

At skapa trivnað og á ein pedagogiskan hátt tryggja búfólkunum menningarmøguleikar og saman við teimum finna útav, hvussu innihaldið í gerandisdegnum skal virka.

Dentur verður lagdur á, at tann ið sett/ur verður, hevur evni og vilja at samstarva og samskifta við avvarðandi hjá búfólkunum og við starvsfelagar, og er áhugað/ur at luttaka aktivt í øllum avbjóðingum á arbeiðsplássinum og er opin fyri nýhugsan.

**Lønar- og setanartreytir:**
Tænastumannastarvið verður sett sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag, og lønt stigini, 24, 25, 27, 28 og 30 til 33.

Farloyvisstarvið verður sett sambært sáttmálan millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag fyri sáttmálasettar pedagogar og lønt stigini 11 til 18.

Nærri fæst at vita um starvið frá Oddfríðu Højgaard leiðara á tlf. 226121.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum v.m. skal sendast til:

**Bústovnurin á Rúnarvegi**
Att. Leiðarin
Rúnarvegur 6
620 Runavík

**Umsóknarfreistin er 2. juli 2006 kl. 12.00.**

---

Sosialurin
www.sosialurin.fo